# Fa. Billutir í Kollafirði útvegar eykalutir skjótt og bíliga

MAGNUS GUNNARSSON

Fa. Billutir í Kollafirði varð stovnað í 1993, við tí endamáli at útvega bíligar eykalutir til bilar. Hetta var í eini tíð, tá fíggjarkreppan herjaði, sølan av bilum var so gott sum ongin, og hevði hetta við sær stóran eftirspurning eftir bíligum eyka lutum.

Fa. Billutir er bæði smá- og heilsøla, ið selur um alt landið. Stjóri í fyritøkuni er Petur Martin Johansen.



Anton Jacobsen og Petur Martin Johannesen í handlinum »Billutir« í Kollafirði, sum nú hava ment kundatænastuna enn meira

Mynd: Jens Kristian Vang

### Allir vanligir slitlutir á goymslu

At byrja við var tað mesta keypt úr Skotlandi, pundið var lágt, og ferðasambandið gott. Smyril fór úr Skotlandi leygardag og var í Føroyum mánadag. Eftir at Smyril gavst við hesi sigling bar ikki so væl til at handla við Skotland meira, tí tað tók alt ov langa tíð. Eisini er pundið styrknað, samstundis sum prísirnir úr Danmark eru blivnir meira kappingarførir. Nakað kemur tó framvegis úr Skotlandi.

Fa. Billutir hevur allar vanligar slitlutir til bilar á goymslu, og styrkin hjá fyritøkuni er, at teir útvega nýggjar og brúktar eykalutir skjótt og bíliga. Teir útvega allar karrossarílutir, so sum skermar, hurðar og tílíkt, alla vanliga bilútgerð, akkumulatorar, handamboð, handreinsievni og ymisk sløg av filtrum til skip.

Við tað at virksemið er so nógv vaksið, er ætlanin at bøta um umstøðurnar við at byggja eina nýggja høll til eykalutirnar við sølubúð.

### Eykalutaskipan og bremsutestari

Á bilframsýningini verður sýnt fram eitt telduforrit, sum er ein vøruskrá við eykalutum, sum bilverkstøð og servicustøðir kunnu keypa, har tey á skerminum sjálvi finna nummarið á eykalutinum, prísin, og hvat tíð tað tekur at skifta lutin, eins og øll onnur teknisk data um bilin.

Tá kunnu verkstøðini bíleggja við at siga nummarið á eykalutinum, og tey vita longu prísin framman. Hetta verður ein stór hjálp hjá bilverkstøðunum, sum beinanvegin kunnu siga, hvussu nógv umvælingin kostar.

Eisini verður ein bremsutestari vístur fram, so fólk kunnu síggja, hvussu bremsurnar virka, og hvønn týdning tað hevur fyri trygdina, at bremsurnar eru í ordan. Serkøn fólk koma úr Danmark at vísa fram forritið við eykalutunum og bremsutestaran.

Petur Martin væntar sær nógv av hesi framsýningin og sigur, at teir fara at hava fleiri góð tilboð.

Fa. Billutir
FO-410 Kollafjørður
Tlf. 421605
Fax 421666





*Á bilframsýningini verður sýnt fram eitt telduforrit, sum er ein vøruskrá við eykalutum, sum bilverkstøð og servicustøðir kunnu keypa, har tey á skerminum sjálvi finna nummarið á eykalutinum, prísin, og hvat tíð tað tekur at skifta lutin, eins og øll onnur teknisk data um bilin*



*Fa. Billutir umboðar Easyline strípuavmerking, ið er bílig, slitsterk og løtt at arbeiða við. Easyline er vælegnað til avmerking á virkjum, til parkeringsbásar og spælipláss hjá børnum*



# Býrt tú í Danmark kanst tú ikki koyra føroyskt skrásettan bil

Av tí at nógvir Føroyingar fara til Danmarkar í summarfrítíðini, og at mangir av teimum hava skyldfólk har, so tykist spurningurin um, hvør hevur loyvi at koyra bilin í Danmark, ørkymla mong. Fleiri hava eisini spurt, hví Bileftirlitið ikki kunnger tílíka lóg, sum ásetir, hvør hevur loyvi at koyra bilin í Danmark. Orsøkin er tann, at hetta er ein donsk lóg, sum er kunngjørd í Danmark.

Tá ið Føroyingar koma til Danmarkar við einum bili, sum er skrásettur í Føroyum, so verða Føroyingar mettir sum útlendingar. Í lógini verður hetta kallað „bopælskriteriet“, og tað hevur hvørki við ferðslulóg ella ferðslutrygd at gera, men tað er íkomið í sambandi við, at avgjøld eru løgd á bilar.

Hetta merkir, at tann, ið fer til Danmarkar at ferðast við bili, sum er skrásettur í Føroyum, kann ikki læna vinum, kenningum ella skyldfólki bil sín. Einastu undantøk eru, um einum tørvar hjálp t.d. at koyra umborð á ferju ella at koyra bilin til ella frá verkstaði. Sambært „bopælskriteriet“ eru Føroyingar at rokna sum útlendingar, og føroyskt skrásettir bilar sum útlendskir, t.v.s. at tey, sum eru skrásett sum búgvandi í Danmark, hava ikki loyvi at koyra ein bil, sum er skrásettur í Føroyum.

Harafturímóti er einki í lógini, sum forðar fyri, at føroyingar ikki hava loyvi at koyra ein bil í Føroyum, hóast hann er skrásettur í Danmørk.

Kelda: Ferðslutrygd
www.rff.fo

# Fleiri missa koyrikortið á Oyggjarvegnum

Í hugaheiminum hjá mongum ungum tykist tað, sum er Oyggjarvegurin vorðin óalmenn kappkoyringarbreyt. Ein afturvendandi roynd við kvikum bilum er at vita, hvussu nógva ferð hann klárar at vinda seg uppá niðan fram við Grøv. Ungdómarnir kenna seg rættiliga tryggar, nú nærum øll ferðslan gongur gjøgnum Kaldbakstunnilin, og lítil ferðsla er á oynni. Men sambært løgregluni verða fleiri kanningar gjørdar á Oyggjarvegnum, og løgreglan er rættiliga ofta á staðnum. Og fleiri hava mist koyrikortið undir kappkoyringini á Oyggjarvegnum.

Kelda: Ferðslutrygd
www.rff.fo



# Nú SKAL koyrikortið verða umbýtt!

Aftan á 31. desember í ár verður gamla føroyska koyrikortið ógildugt - bæði í Føroyum og uttanlands.

Bileftirlitið hevur nú fleiri ferðir lýst í fjølmiðlunum og heitt á fólk um at minnast til at býta gamla koyrikortið um við eitt nýtt í ES-sniði.

Men lítið nyttar. Tað er soleiðis, at koyrikortið skal í seinasta lagi verða umbýtt føðingardagsmánaðin; men heitt verður eisini á øll, sum skulu uttanlands, at býta koyrikortið um í góðari tíð. Avgreiðslutíðin kann verða upp til tveir mánaðir, og Bileftirlitið ætlar ikki at seta eyka fólk ella at stytta um summarfrítíðina hjá stovninum fyri at avgreiða koyrikortini.

Nevnast kann, at Føroyingar uttanlands hava havt stórar trupulleikar av gamla koyrikortinum, tí serliga teir yngru løgreglumenninir kenna tað als ikki.

Kelda: Ferðslutrygd
www.rff.fo

# Píkarnir av

Nú nærkast 1. mai, og 30. apríl er seinasti dagur, sum loyvt er at koyra við píkadekkum. Løgreglan upplýsir, at tað ikki verður farið út at kanna bilar, um tað er kavarok og hált 1. mai, men at vanligt er at byrja at kanna bilar stutt eftir mánaðarskiftið.

Um koyrt verður tá við píkadekkum, verður bót givin á staðnum.

Kelda: Ferðslutrygd
www.rff.fo



# Minningardagur teirra, sum farin eru í ferðsluni

Spurningurin um at hava ein minningardag fyri teimum, sum farin eru í ferðsluni, hevur tikið seg upp aftur. Hóast evnið er viðbrekið, og fólk munnu hava ymiskar áskoðanir, so tykist tað, sum er stór undirtøka fyri, at skipað átti at verið fyri tílíkum degi.

Men tá ið hetta mál hevur verið umrøtt - og tað hevur tað verið fleiri ferðir, so hevur altíð verið spurt, hvussu ein tílíkur dagur so skal verða skipaður? Givið er tað, at ein tílíkur dagur kann neyvan verða skipaður sum ein almennur kirkjuligur minningardagur, sjálvt um Hans Jákup Joensen, biskuppur, hevur mælt til, at tey, sum farin eru í ferðsluni, eisini verða mint allahalgannadag.

Ingi Gunnarsson í Havn, sum í fjør kom við uppskoti um ein minningardag, umhugsar nú at fyrireika ein tílíkan minningardag. Ætlan hansara er at fáa onnur at taka undir við ætlanini um at velja ein ávísan dag, tá ið blómutyssi verða løgd við vegjaðaran á vanlukkustøðunum til minnis um teirra, ið har fórust í ferðsluni, og teimum til ávaringar og virðiliga umhugsan, sum fara framvið í bilum sínum.



*M. a. ætlar Ingi Gunnarsson í Havn at fáa onnur at taka undir við ætlanini um at velja ein ávísan dag, tá ið blómutyssi verða løgd við vegjaðaran á vanlukkustøðunum til minnis um teirra, ið har fórust í ferðsluni*

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**

**www.sosialurin.fo**

**Verið vælkomin á bilstevnuna 2000 har vit sýna fram ymisk snið av Suzuki bilum**







Sosialurin - 311820

SUZUKI

**Sp/f Eyðbjørn Hansen**

Varðagøta 75 • FO-100 Tórshavn • Tel. 313375 • Fax 31 14 95
Heimasíða: www.suzuki.fo • E-mail: suzuki@suzuki.fo